tíðindablaðið

sosialurin

Nr. 72 Mikudagur 12. apríl 2000 74. árgangur www.sosialurin.fo Kr. 10,00

# Fakfeløgini í øðini inn á løgtingsmann

Løgtingið hevur einki at gera við læraraverkfallið, og bæði Jákup Sverri Kass og allir aðrir løgtingsmenn skulu halda seg langt burtur, siga stóru fakfeløgini

**Síða 6**

## Tvíkiljur av Eiði til Skotlands

Fríggjadagin var eitt farmaskip á Eiði við skrokkunum til fýra tvíkiljur, sum skulu gerast lidnar í smiðjuni hjá HydroTech. Ein av hesum bátunum er seldur til Skotlands, og á HydroTech vóna teir at gera fleiri sáttmálar, um skotar vera nøgdir við hendan bátin

**Síða 4**





## Tíggju útisetar á landsliðnum

Allir útisetarnir uttan skaddi Hans Fróði Hansen og Pól Thorsteinsson fara við landsliðnum til Liktinstein

**Ítróttur síðurnar 23-25**



## Danir fyri føroyskum fullveldi

Nýggj donsk kanning sýnir, at tríggir út av fýra dønum taka undir við, at Føroyar loysa frá Danmark

**Síða 3**